# Kjak



**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri*

# Um undrunarverdu raðfestingar kommununar av »dygdarlist«

*Herfyri hevði Kinna Poulsen ummæli um framsýning hjá Astri Luihn. Hetta var nú ikki so nógv eitt ummæli, heldur ein niðurgerðing av nógvum av tí, hon persónliga ikki metir vera dygdarlist.*

Lat meg beinanvegin siga, at eg dugi ikki at definera dygdarlist og dugi helst líka illa sum tey flestu at gera mun á dygdarlist, vánalist og ítrivslist ella handverkslist. Men hinvegin havi eg valt at hyggja og uppliva við tolsemi og eyðmjúkleika, uttan at vera fordømandi.

Eg skal tí als ikki leggja meg út í at definera list. Fyri mær er list fyrst og fremst ein spurningur um persónliga uppfatan og uppliving, um við tolsemi at loyva sær at granska tað nýggja, og annars sum politikkari at vera við til at skapa listini teir neyðugu karmarnar, so listin sovítt møguligt kann hava fríar teymar og ein natúrligan útvikling og vøkstur.

**Fyri mær er list fyrst og fremst ein spurningur um persónliga uppfatan og uppliving**

## Harmur um niðurgerðing

Tað harmar meg almikið at lesa slíka niðurgerðing sum hesa. Serliga tá spurningur verður settur við kommunalu raðfestingarnar og gjøldur verður gjørdur burturúr tí kunnleika, kommunan byggir sínar raðfestingar á.

Vitandi, at føroysk list ikki bara snýr seg um at koma á almennu ella kommunalu fíggjarlógina, so er Tórshavnar kommuna kortini rættiliga langt frammi í skónum, tá tað snýr seg um at skapa listini best møguligu umstøðurnar. Kommunan letur t.d. 1,5% av byggikostnaðinum av øllum nýggjum kommunalum bygningum beinleiðis til list.

Kommunan umsitur umframt ein heilan hóp av stovnum, ið verða listprýddir á ymsan hátt, játtar studning til feløg og einstaklingar, listprýðir allar kommunalar bygningar, skipar fyri listaframsýningum í Snarskivuni, Smiðjuni í Lítluvík og í Müllers pakkhúsi, stuðlar bóka- og tónleikaútgávum, umsitir grunnar og legatir og veitir mentanarvirðislønir, keypir standmyndir og keypir árliga nógva list til ymisk endamáli. Haraftrat hevur kommunan brúkt og brúkar stórar upphæddir til at varðveita søguliga list.

## Fjølbroytt ráðgeving

Gjøgnum árini hevur kommunan havt hópin av fólki sum ráðgevar. Seinastu trý árini hevur kommunan havt ein listabólk, sum arbeiðir eftir samtyktari reglugerð. Í bólkinum sita býararkitekturin, listarligi leiðarin á Listasavni Føroya og leiðarin á Mentamáladeildini hjá kommununi, sum hevur umsitið slík mál í 25 ár. Hesin bólkur hevur víðar heimildir, hann kann velja ávís listafólk út ella bjóða kommunal arbeiði alment út. Bólkurin hevur gjørt bæði.

Umframt at listabólkurin arbeiðir undir mentamáladeildini, so samskiftir og samstarvar hann við ráðgevar innan byggilist og list, og er tørvur á serkunnleika til ávís mál, so verður tílíkur kunnleiki útvegaður. Og tað er galdandi fyri allar slíkar kommunalar avgerðir. So at skuldseta kommununa fyri at byggja raðfestingar á vantandi kunnleika, er at vanvirða ein fjølbroyttan hóp av verandi kunnleika innan byggilist, list og løgfrøði, sum hava ráðgivið í ótaldum málum av hesum slag.

--

Ætli mær ikki út í eitt kjak við Kinnu Poulsen um hesi viðurskifti annars. Eg skal heldur ikki geva Kinnu Poulsen ráð um myndlist, tó vil eg heita á hana, næstu ferð hon skrivar ummæli, at ummæla listina og ikki persónarnar.

**Vitandi, at føroysk list ikki bara snýr seg um at koma á almennu ella kommunalu fíggjarlógina, so er Tórshavnar kommuna kortini rættiliga langt frammi í skónum, tá tað snýr seg um at skapa listini best møguligu umstøðurnar**

# Flytið tey heim!



**Heðin D. Poulsen,**
**Kristina Toftegaard Larsen,**
**Karl A. Olsen og**
**Kári á Rógvi**
*valevni Sjálvstýrisfloksins*

Seinnu árini hava verið merkt av knappligum kunngerðum um, at størv og stovnar flyta úr eini oyggj í aðra. Landsstýrisfólk flyta stovnar – og av berari tilvild enda teir har, sum tey sjálvi ætla sær atkvøður. Seinast var eitt starv niðurlagt í Havn og trý størv stovnað í Suðri – samlaða umsitingin veksur, tí samraksturin verður burtur. Tann frálíki arbeiðsmarknaðardepilin, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum vildu víðka út frá góðu royndunum við ALS, ja hann minkar í staðin; synergi og samstarv mugu víkja, tí onkur kemur í tankar um at hava gloymt sína føðioyggj.

## Eftirskúli í Suðuroy

Framburðssinnaði politikkurin hjá Sjálvstýrisflokkinum hevði ført heilt annan politikk við sær. Suðuroyggin hevði fingið nógv fleiri og betri størv. Sjálvstýrisflokkurin hevur gingið á odda at skipa eftirskúla í Suðri. Føroyingar fylla í løtuni fleiri skúlar í Danmark. Við næmingunum fara bæði skúlagjøld, lummapengar – og fleiri góð størv.

## Føroyingar í føroysk fongsul

Vit hava eisini víst á, at tað er mannminkandi at føroyskir fangar sita í fongsli í Danmark. Bæði fyri virðiligu viðferðina av teimum og teirra avvarðandi – og eisini fyri størvini – eiga vit at skipa fongsul í Føroyum. Tíðin, tá ið fangar vóru sendir um hav, er endað alla aðrastaðni enn her hjá okkum.

## Fleiri útbúgvingar í Føroyum

Einamest vilja vit tó hava útbúgvingarnar heim. Bjóða vit allar vanligar útbúgvingar og eftirútbúgvingar út í Føroyum, fáa vit fleiri útbúgvin fólk, men vit fáa eisini betur útbúgvin fólk eftir føroyskum fortreytum. Vit varðveita størri part av teimum útbúnu, vit fáa fleiri kundar og fleiri starvsfólk í tænastuvinnum, vit fáa fleiri starvsfólk í útbúgvingarvinnu og avleiddum vinnum.

## Flytið størv heim!

Vit eru sannførd um, at liberalur framburðspolitikkur er betri: at flyta størvini úr útlandinum og heim til Føroya, heldur enn hetta óvirðiliga stríðið at nápa nøkur hissini størv frá hvør øðrum.